**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**

**Yvirlitstrolingar á Føroyabanka. Túrur nr. 1234.**

**Tíðarskeið: 29/9-5/10 - 2012**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Sigvald Kristiansen og Lis Larsen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinshamn lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini leygardagin 29/9 kl. 13. Fyrst vórðu tvey hál tikin við svartkjaftatroli eystan- og vestan fyri Sandoy, umframt CTD+glúp, og skrásett undir egnum túri (nummar 1232). Í fyrra hálinum var einki, meðan fýra makrelar vóru í seinna hálinum. Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka sunnumorgunin og kláraðu at taka allar 29 trolstøðirnar, umframt CTD-støðir, í bert fimm dagar (sunnudag til hósdag), m.a. tí at veðrið var til vildar. Vit landaðu í Havn leygarmorgunin.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var ikki eftir ætlan (umleið 400), tí vit fingu so lítið av toski, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 5. oktober. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. desember.

**Fyribilsúrslit:** Sera lítið var at fáa av toski (703 kg, 72 stykkir), sí Talvu 1, sum samanber 2012 og 2011. Tó at lítið varð fingið av hýsu í vekt, var talið av smáari hýsu stórt. Magakanningarnar vístu, at tað var nakað til av smáari nebbasild.

Í mun til tíðarskeiðið 1996-2012, er ongantíð so lítið fingið av hýsu sum í 2012 (Mynd 1, legg til merkis y-ásina, sum vísir 1, 10, 100 osfr.). Hýsa og upsi vísa á leið somu gongd í hesum tíðarskeiði, eina øking til umleið 2003 og síðan eina minking. Nógv var at fáa av toski í 1996-1998 og 2001-2002, meðan lítið hevur verið at fingið eftir 2005. Glýsufiskur vísir øvugtu gongd, og er vorðin meira vanligur eftir 2008. Hetta minnir um hvítingsbróður á føroyska landgrunninum.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1234.

| FISKASLAG | KG í 29 hálum í 2012 | Nytrur | Magar | KG í 24 hálum í 2011 | KG per HÁL 2012 / 2011 |
|---|---|---|---|---|---|
| HAVMÚS | 2119.71 | | | 1526.38 | 1.15 |
| KNURRHANI | 1390.49 | | | 301.65 | 3.81 |
| GULLLAKSUR | 1378.74 | | | 397.68 | 2.87 |
| SVARTKJAFTUR | 807.93 | | | 157.52 | 4.24 |
| HÝSA | 773.11 | 326 | 67 | 1052.98 | 0.61 |
| TOSKUR | 703.21 | 72 | 49 | 1189.57 | 0.49 |
| LOLIGO | 449.09 | | | 1257.14 | 0.30 |
| UPSI | 439.06 | 73 | 27 | 169.68 | 2.14 |
| GLÝSUFISKUR | 196.37 | | | 193.55 | 0.84 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 153.25 | | | 70.81 | 1.79 |
| SILVURMURTUR | 151.74 | | | 386.27 | 0.33 |
| LONGA | 127.74 | | | 121.13 | 0.87 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 123.61 | | | 68.53 | 1.49 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 57.84 | | | 9.78 | 4.90 |
| SKRAMBUL | 52.26 | | | 28.99 | 1.49 |
| KALVI | 50.19 | 1 | 2 | 204.07 | 0.20 |
| GLASKVOYSA | 48.90 | | | 10.22 | 3.96 |
| SKØTA | 35.13 | | | 0.00 | |
| STÓRI KONGAFISKUR | 33.42 | | | 51.62 | 0.54 |
| HAVTASKA | 26.83 | 6 | | 65.77 | 0.34 |
| BROSMA | 25.53 | | | 9.64 | 2.19 |
| ROSSAMAKRELUR | 21.23 | | | 17.48 | 1.01 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 12.09 | | | 0.00 | |
| TUNGA | 9.75 | | | 23.64 | 0.34 |
| LÍTLA BROSMA | 8.58 | | | 5.54 | 1.28 |
| NEBBASKØTA | 6.28 | | | 0.00 | |
| SANDSPRØKA | 6.17 | | | 13.73 | 0.37 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 5.46 | | | 3.27 | 1.38 |
| TRANTKONGAFISKUR | 5.44 | | | 2.13 | 2.12 |
| SILVURKALVI | 4.65 | | | 0.00 | |
| REYÐI KNURRHANI | 3.72 | | | 3.63 | 0.85 |
| BLÁLONGA | 1.20 | | | 1.18 | 0.84 |
| SVARTFISKUR | 1.05 | | | 0.00 | |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 0.93 | | | 0.00 | |
| HAVNEBBASILD | 0.46 | | | 0.00 | |
| HVÍTINGUR | 0.32 | | | 0.00 | |
| VØRPUSKEL | 0.17 | | | 0.00 | |
| MAKRELUR | 0.09 | 4 | | 210.46 | 0.00 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.09 | | | 0.00 | |
| NEBBASILD | 0.01 | | | 0.04 | 0.22 |
| LAKSSILD | 0.01 | | | 0.00 | |
| TILSAMANS | 9231.79 | 482 | 145 | | |




Mynd 1. Veiða upp á roynd (kg/troltíma) hjá Magnusi Heinasyni av toski, hýsu, upsa og glýsufiski á Føroyabanka í september 1996-2012.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1234d.doc.

<u>Petur Steingrund</u>